# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

Bilarnir í "Kringvarpsgarasjuni":

# Býbilur og ektaður SUV




*Bilarnir í "Kringvarpsgarasjuni" hesa ferð: Peugeot 107 og Honda CR-V*

**Bilarnir, sum vórðu umrøddir í útvarpssendingini "Bylgjan" í Kringvarpi Føroya mikudagin 2. mai, vóru Peugeot 107 og Honda CR-V**

BILAR

Í útvarpssendingini "Bylgjan" í Kringvarpi Føroya mikudagin vóru tveir bilar umrøddir. Talan var um minibilin Peugeot 107 og Honda CR-V, ið er ein 5-persóna SUV.

Peugeot 107 er ein lítil økonomiskur bilur, ið verður gjørdur á eini verksmiðju í Kekkia saman við Toyota Aygo og Citroën C1. Bilarnir eru eins, men teir hava hvør sín identitet við egnu búmerkjum og sereyðkennum.

Talan er um væl egnaðar økonomiskar býbilar, sum fáast við bæði 3 og 5 hurðum.

Bilurin, ið varð royndarkoyrdur, var ein Peugeot 107 Trendy 5/h við 1.0 litra 3 syl. bensinmotori við 68 hk og koyrir heilar 21,7 km/l í meðal. Tann bilurin kostar kr. 124.000. Peugeot 107 fæst eisini við 1,4 litra (4 syl.) dieselmotori við 54 hk og koyrir 24,4 km/l. So talan er um ein rættuliga økonomiskan bil. Bíligasti Peugeot 107 við trimum hurðum kostar kr. 118.000 hjá Auto Service.

Honda CR-V er ein rúmligur 5-persóna SUV (Sport Utility Vehicle). Hesin nýggi er triðja generatión, síðan CR-V fyrstu ferð kom á marknaðin fyri 11 árum síðan. Talan er um ein bil við nútímans designi og innrættingin, sum á flestu nýggju SUV – einfalt, smart og lið-iligt. Girstongin situr sera væl fyri í instrumentborðinum, og bilurin er lættur at handfara og koyra.

Bilurin, sum varð royndarkoyrdur, hevði 2,0-litra bensinmotor við 150 hk og kostaði 369.000 hjá Norðbil. CR-V fæst eisini við 2,2 litra dieselmotori við 140 hk.

Tað var útvarpsmaðurin Kári Sólstein, sum tosaði við Sofus Hansen, bilbyggjara, og Óla Jákup Rólantsson og Magnus Gunnarsson, sum skriva um bilar í ávikavist Vikublaðnum og Sosialinum.

*mg.*



*Kári Sólstein og Sofus Hansen*




## Bilar við minst trupulleikum

**ADAC (Allgemeiner Deutscher Automobil-Club)er størsti bilfelagsskapur í Týsklandi. ADAC arbeiða úti á týsku vegunum og hjálpa bilførarum, sum hava trupulleikar**

Á hvørjum ári senda teir út frágreiðingar, sum vísa hvussu tey ymisku bilmerkini klára seg á týsku motor- og landavegunum. Næstan tvær milliónir bilar høvdu hjálp fyri neyðini í fjør. Her er ein listi yvir fimm av teimum ymisku bilunum, sum høvdu minst trupulleikar.

**Smáir bilar**
*1. Audi A2*
*2. Mini*
*3. Renault Modus*
*4. Volkswagen Lupo*
*5. Volkswagen Polo*

**Minni miðalklassin**
*1. BMW 1-serie*
*2. Mazda 3*
*3. Audi A3*
*4. Volkswagen Golf/ Bora*
*5. Volkswagen New Beetle*

**Miðalklassin**
*1. Audi A4*
*2. Mercedes-Benz C-klasse*
*3. BMW 3-serie*
*4. Volkswagen Passat*
*5. Mazda 6*

**Luksusklassin**
*1. Audi A6*
*2. Mercedes-Benz E-klasse*
*3. BMW 5-serie*
*4. Opel Signum*
*5. Volvo S60/ V70*

**Off-road 4x4**
*1. BMW X3*
*2. Mercedes-Benz M-klasse*
*3. Toyota RAV4*
*4. BMW X5*
*5. Volkswagen Touareg*

**MPV**
*1. Mazda Premacy*
*2. Mitsubishi Space Star*
*3. Volkswagen Touran*
*4. Volkswagen Caddy*
*5. Ford Fusion*

**Stórir MPV**
*1. Volkswagen Sharan*
*2. Volkswagen Transporter T4/ T5*
*3. Fiat Ducato*
*4. Mercedes-Benz Vito/ Vaneo*
*5. Ford Galaxy*

*Kelda: ADAC*